# Fólk lána meir bøkur

**Bæði á Býarbókasavninum í Havn og á Klaksvíkar Bókasavni læntu fólk munandi fleiri bøkur í fjør enn undanfarin ár**

BØKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Ongantíð fyrr hava so nógvar bøkur verið læntar út á Klaksvíkar Bókasavni sum í fjør*

Betri samferðslumøguleikar og fleiri tilboð hava gjørt sítt til, at Klaksvíkar Bókasavn og Býarbókasavnið í Havn hava havt óvanliga nógv vitjandi í fjør. Talið á útlæntum bókum á Klaksvíkar bókasavnið var tað hægsta nakrantíð og eisini á Býarbókasavninum lána fólk alsamt oftari bøkur.

## Stór menning

Á Býarbókasavninum var talið á útlánum 92.119.Tað eru uml. 10.000 meira enn 2008. Eisini vaks talið á vitjandi við eini 4000 í mun til í fjør.

1. apríl 2009 vóru 40 ár síðan, at Býarbókasavnið varð sett á stovn. Ein framsýning varð tá sett upp, sum lýsti virksemið hjá bókasavninum árini 1969 – 2009. Framsýningin vísti, at stór menning er farin fram, serliga aftan á, at bókasavnið fekk telduskipan.

Hølisviðurskiftini vóru vánalig tey fyrsti árini, men tá ið hølini hjá teknisku deildini hjá Tórshavnar kommunu kom upp í 1993, munaði tað nógv til tað betra.

Borgarstjórin Heðin Mortensen legði á føðingardegnu upp til, at Býarbókasavnið, sum í nógv ár hevur havt sera trongar umstøður, skal fáa meir pláss. Seinri í 2009 keypti Tórshavnar kommuna allan bygningin, sum bókasavnið hevur leigað ein part av hesi 40 árini. Nú er bert spurningur um tíð, nær bøtt verður um hølisviðurskiftini, og bókasavnið kemur niður á fyrstu hædd við beinleiðis inngongd frá Niels Finsens gøtu, vita tey at siga á Býarbókasavninum.

## Nógv tilboð

Ymisk tiltøk hava verið fyri børn t. d. føstulávintsklipp, teknikapping og summarkapping, har børnini ummæltu bøkur. Í jólamánaðinum var Býarbókasavnið ein partur av tiltakinum: *Jól í miðbýnum* og hevði *jólahugnastovu* fyri børn og vaksin á 1. hædd. Tiltakið varð rættiliga væl vitjað.

Umframt útlán og lesistovu, bjóðar Býarbókasavni eisini teimum vitjandi at nýta teldurnar ókeypis. Eisini hava tey eitt tilboð, har starvsfólk koyra út eina ferð um mánaðan til fólk, sum vegna rørslubrek ella annað brek ikki hava møguleika at koma á bókasavnið.

Verða skúlabókasøvnini rokna við, var samlaða talið av útlánum í Tórshavnar Kommunu í fjør 128.819 bøkur, ljóðbøkur, dvd-filmar

## Met í Klaksvík

Eisini á Klasvíkar bókasavni høvdu tey úr at gera í fjør, har útlánið var tað hægsta higartil við 26.936 útlánum. Tað vil siga at útlánið vaks við heili 2500 í mun til 2008

Á bókasavninum í Klaksvík hava tey eisini merkt, at tað hevur verið meira at gjørt í fjør í mun til onnur ár. Serliga í sambandi við uppgávur hjá miðnáms- og fólkaskúlanæmingum, men eisini í heila tikið hava fleiri vitjanir verið í ár. Undirsjóvartunnulin og tað at fleiri miðnámsskúlar eru í økinum hevur eisini gjørt, at nógv fólk úr Eysturoynni og aðrastaðni í landinum koma at lána á Klaksvíkar bókasavni, frætta vit úr Klaksvík.

Agenda 21 ráðgevi

**Starvið sum ráðgevi hjá Agenda 21 stovuni er leyst at søkja.**

**Á Agenda 21 stovuni ført tú høvi til at skapa egnar karmar og ávirka arbeiðsgongdina á Agenda 21 økinum í Føroyum.**

**Virksemið á Agenda 21 stovuni er at seta í gongd lokalar Agenda 21 verkætlanir í kommununum. Stovan umsitur harumframt politisk og umsitingarlig netverk í kommununum.**

**Í 2010 eru spennandi og avbjóðandi uppgávur á skránni. Nevnast kunnu t.d.**

- **Fishing for Litter, verkætlan at fáa rusk úr havinum og til lands**
- **LA 21 og borgarin, verkætlan at inndraga borgaran í lokala umhvørvisarbeiðið og**
- **Grøna skjalið, at skipa Agenda 21 arbeiðið í kommununum.**

**Stovan luttekur eisini í fleirtjóða samstarvi. Í hesum sambandi má roknast við ferðing uttanlands.**

**Agenda 21 stovan heldur til í hølunum hjá Føroya Kommunufelag í Kvívík.**

**Vit bjóða eitt starv við spennandi uppgávum og avbjóðingum:**

**Arbeiðsuppgávurnar fevna um, at**

- **veita ráðgeving í málum um burðardygga menning,**
- **gera uppsøkjandi arbeiði,**
- **standa fyri skeiðum og fundum og**
- **fáa samskifti í lag við brúkarar.**

**Vit vænta, at tú m.a. hevur:**

- **viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni ella aðra útbúgving og royndir, sum kunnu sammetast við hesa**
- **umsitingarligar royndir**
- **kunnleika til kommunal viðurskifti**
- **hollan kunnleika at samskifta, bæði í skrift og talu, á føroyskum, donskum og enskum**
- **hegni at arbeiða sjálvstøðugt, samstarva og vera málsøkjandi.**

**Setanarviðurskifti:**
**Starvið verður sett 1. april ella skjótast gjørligt. Roknast má við, at til tíðir verður neyðugt at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð.**

**Løn samb. avtalu.**

**Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Bergmann Finnsson ráðgeva, á tel.: 590 766 ella agenda@fkf.fo.**

**Les meira um virksemið á Agenda 21 stovuni á www.fkf.fo.**

**Umsókn:**
**Umsókn við prógvum, CV og viðmælum, skal vera Føroya Kommunufelagi í hendi í seinasta lagi mánadagin 8. mars 2010 kl. 13:00.**

**Føroya Kommunufelag**
**frammi í Gerði 1**
**340 Kvívík**

FØROYA KOMMUNUFELAG

Skrivstova Føroya Kommunufelags er nýliga nútímansgjørd og í vøkrum náttúruumhvørvi. Arbeiðsumhvørvið er óhátíðarligt og nýmótans hentleikar til taks.

Agenda 21 stovan er samstarv millum Føroya Kommunufelag, Innlendismálaráðið og kommunurnar. Føroya Kommunufelag stovnaði Agenda 21 stovuna í 2004.

Føroya Kommunufelag er felagskapur, sum virkar fyri áhugamálum hjá kommunum og umboðar limirnar mótvegis landinum og útlendskum kommunufelagsskapum. Felagið umboðar 23 kommunur.